## Kappingar-psykologi í FSF-húsinum

SKEIÐ
*Tíðindaskriv*

Skeið um ítróttar- og kappingarpsykologi verður í FSF húsinum 21. mai kl. 13-20 og 22. mai kl. 09 - 20. Skeiðleiðari verður Jørn Ravnholt frá Danmarks Idræts Forbund, sum hevur undirvíst á meiri enn 200 skeiðum um ítróttarsálarfrøði. Hann hevur í 16 ár samskipað ítróttarsálarfrøðissligu tænastuna hjá Team Danmark og verið ráðgevi hjá meiri enn 30 donskum landsliðum í flestu ítróttargreinum.

Málbólkurin er venjarar, ítróttarfólk og onnur, sum ynskja innlit í og grundleggjandi vitan um ítróttarsálarfrøði.

Einki krav er um ávíst støði til tess at kunna taka lut á skeiðnum, sum er grundað á bókina »Den nye bedst når det gælder« hjá kenda norska professarinum Willi Railo. Fyrireikararnir siga, at á skeiðnum fært tú eitt gott »mentalt amboð«, sum fer at hjálpa tær at seta mál og røkka teimum.

Tað er Synergi (www.synergi.fo), sum skipar fyri skeiðinum.

## Finsk framgongd í Russlandi

Finska vinnulívið fær nógvar pengar burturúr, at russiski búskapurin er í vøkstri. Hufvudstadsbladet skrivar, at útflutingurin hjá nógvum finskum fyritøkum til Russland er nógv øktur seinastu mánaðirnar. Russiska BNP vaks í fjør við sjey komma trimum prosentum, og aftaná Kina og India er hetta tann størsti búskaparligi vøksturin í heiminum. Tann geografiski nærleikin er stórur fyrimunur fyri finska vinnulívið, og finsku vørurunar eru kappingarførar við vørur úr øðrum londum. Finnland innflyti eisini nógv úr Russlandi, og tveir triðingar av allari olju koma úr Russlandi.

**VIÐMERKINGAR**

# Stundin komin til trygdar- og verjupolitiska støðutakan

**Jaspur Vang**
*Tvøroyri*



Føroyska samfelagið hevur roynt at gera upp við landspolitiska ábyrgdarloysið, sum fyri ikki so nógvum árum síðani elvdi til seinastu álvarsligu búskaparkreppuna. Sitandi samgonga er farin at taka upp eftir fíggjarliga ábyrgdarloysið, sum eyðkendi undanfarnu fullveldissamgongurnar. Stundin er soleiðis eisini komin til at gera upp við trygdar- og verjupolitiska ábyrgdarloysið, sum valdað hevur seinastu mongu árini.

Stjórnin boðaði fyri stuttum frá ætlanum um í stóran mun at skerja virksemið hjá Nato og donsku herdeildunum á føroyskum øki. Løgmaður hevur lagt fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi framtíðar verju- og trygdarpolitisku støðu Føroya og hevur ein meiriluti í Uttanlandsnevndina nú tikið undir við uppskotinum. Eftir er bert at vóna, at ein greiður meiriluti á Føroya Løgtingi sær álvaran í, at tað er neyðugt, at vit føroyingar langt um leingi taka støðu til - og ábyrgd av egnari trygd og soleiðis vinna okkum álit, virðing og viðurkenning. Fyrst tá fáa vit neyðuga ávirkan.

### Vinstrarák eystaneftir og dupultmoralur

Áðrenn jarnteppið fall og sosialistisku stýrisskipanirnar fyri eystan jarnteppið kollsigldu, tóktust sterkar kreftir í Føroyum hava samhug við – og í mongum førum beinleiðis taka undir við nevndu skipanum. Hetta, saman við tá generella vinstrarákinum, hevur uttan iva verið ein høvuðsorsøk til, at Føroya Løgting ikki hevur verið ført fyri at taka greiða støðu til, hvønn trygdar- og verju- politiskan leiklut Føroyar áttu at átaka sær í ríkisfelagsskapinum og harvið heimssamfelagnum annars. Úrslitið hevur verið ein dupultmoralskur trygdar- og verjupolitiskur sjónleikur, har vit føroyringar, uttan greiða politiska støðutakan, men sum partur av ríkinum, hava verið væl vardir av trygdar- og verjufelagsskapinum NATO.

### Settu kílar

Heldur enn at arbeiða fyri ávirkan á trygd og verju landsins, loyvdi undanfarna fullveldissamgonga tá sitandi Uttanlandsnevnd at nýta eitthvørt verjupolitiskt samskifti við stjórnina til at seta kílar millum ríkispartarnar, heldur enn at taka støðu og vinna Føroyum trygdar- og verjupolitiskt álit, virðing og viðurkenning.

Við at krúpa undan støðutakan og annars nýta trygdar- og verjupolitikkin fullveldispolitiskt, vórðu vit soleiðis av okkara egnu fólkavaldu sett uttan fyri alla trygdar- og verjupolitiska ávirkan.

### Rákið vent

Sum nevnt vóru tey mong, sum fyri ikki so mongum árum síðani róku við alheims vinstrarákinum og tí vóru ímóti verjufelagsskapin NATO. Seinastu árini, nú Kalda Kríggið er av, og høgrarákið hevur vunnið - og vinnur alt meira fram, tykjast hesi áður so "eysturhallu" hava ilt við at síggja veruleikan í eyguni. Onkur teirra krúpa uttan um trygdarpolitiska veruleikan og krógva seg undir fullveldishattinum. Eftir øllum at døma út frá teirri strategi, at verður villeiðandi boðskapurin endurtikin nóg ofta, trýr almenningurin boðskapinum sum frálíður, verður soleiðis hildið áfram við læruni um, at einki mál kann loysast - og at føroyingar ikki hava ávirkan og kunnu taka ábyrgd, so leingi viðkomandi málsøki ikki er yvirtikið. Hettar hóast veruleikin er ein heilt annar.

### Strussapolitikkur

Sum tá strussurin stingur høvdið í sandin, føra ávísir politikarar eisini fram, at nú Kalda Kríggið er av og hóttanin eystan eftir harvið er burtur, er spurningurin um trygdar- og verjupolitikk ikki so átroðkandi. Væl kann tað vera, at hesin beinleiðis krígsvandið er av. Hinvegin kann støðan skjótt broytast, eins og aðrir vandar, sum støða má takast til, liggja og lúra. Eins og tað altíð er neyðugt m.a. at tillage vinnulívið í einum landi eftir vinnuligu gongdini og marknaðunum í umheiminum og í búskaparliga góðum tíðum at leggja til síðis og brynja seg til búskaparligar niðurgangstíðir, er tað í friðartíðum neyðugt hjá einum landi at laga trygdar- og verjupolitikkin eftir gongdini í umheimi- num og annars fyrireika seg til - og taka hædd fyri møguligum komandi yvirgang- og krígsvandum. Tí er tað neyðugt at vit føroyingar m.a. taka hædd fyri - og støðu til tann ógvusliga altjóða yvirgangin, sum hevur skakað heimin seinastu árini. Soleiðis er tað eisini neyðugt at vit taka støðu til um - og á hvønn hátt vit skulu verja okkum móti altjóða yvirgangi, eins og tað er neyðugt at taka støðu til, hvørt vit saman við teimum londum, vit fegin vilja samanbera okkum við, hvat frælsi, vælferð og fólkaræðiligum støði viðvíkur, taka ábyrgd í stríðnum móti altjóða yvirgangi og møguligum krígsvandum.

Føroyar eru í ríkisfelagsskapi og eiga at taka støðu út frá hesum veruleika. At tengja trygdar- og verjupolitikk at fullveldistráðanini og harvið misnýta trygdar- og verjupolitisku støðuna, eins og ein lutfallsliga lítil minniluti í andstøðu ger tað í løtuni, er ábyrgdarleyst.

### Fortreytir fyri trygdar- og verjupolitiskum áliti

Skulu vit sum føroyingar vinna okkum álit og vera við, har upplýsingar um eitt nú altjóða yvirgang og hernaðarligar vandar verða viðgjørdir í trúnaði og har trygdar- og verjupolitiskar avgerðir verða tiknar, krevur tað av okkum, at vit her og nú taka ábyrgd av okkara egna landi og greitt boða frá, at at vit sum partur av ríkinum eru partur av NATO og hava ynski um - og viljan til, saman við stjórnini at vera við í altjóða trygdar- og verjupolitiskum høpi. Tað er umráðandi, at henda fráboðan fær breiða politiska undirtøku á Føroya Løgtingi.

Viðgerð av oman fyri nevndu upplýsingum og tað at taka trygdar- og verjupolitiskar avgerðir á hesum grundarlagið, krevur harumframt, at vit hava eina í allar mátar dugnaliga, støðuga, reiðiliga og álítandi landsfyrisiting, eins og tað av landspolitisku leiðsluni og embætismonnunum krevst ein á einhvønn hátt álitsverdug lívsførsla.

### Trygdar- og verjupolitikkur í dag

Frá at vera ein spurningur um tradiotionella verju móti beinleiðis hernaðarligum álopum úr øðrum londum og harvið um beinleiðis krígsførslu millum lond, er trygdar- og verjupolitikkur í dag í størri mun ein spurningur um fleirtjóða trygdar- og friðarvarðveitandi samstarv, so sum fleirtjóða verju móti yvirgangi og kriminaliteti um landamørk. Vit síggja tí, at eitt nú altjóða neyðhjálpararbeiði, - menningarhjálp, - hernaðarlig friðarvarðveitandi átøk og - arbeiði fyri mannarættindum verður alt meira samskipað, eins og løgreglusamstarv tvørtur um landamørk verður alt meira útbygt og samskipað.

Trygdar- og verjupolitikkur í dag er tí ógvuliga førleika- og orkukrevjandi. Hesa orku og hendan førleika hava vit í ríkisfelagsskapinum og eiga vit tí at samstarva um felags loysnir.

### Ikki-hernaðarliga tilbúgvingin

Umframt at vera við til at verja vesturheimin undir kalda krígnum, verja limalondini móti altjóða yvirgangi og m.a. hava fiskiveiðueftirlit og verja havumhvørvið móti dálking, hava herdeildirnar á okkara leiðum verið - og eru framvegis ein týðandi liður í okkara ikki-hernaðarligu tilbúgving.

Hesar deildir eru væl útbúnar og væl vandar, eins og tær hava dygdargóða bjargingsútgerð um hendi. Tí eru deildirnar sera væl skikkaðar at luttaka, tá talan eitt nú er um:

- bjarging á sjógvi og landi,
- leiting á sjógvi og landi,
- burturbeining av vandamiklum spreingievnum og spreingiknøttum,
- sjúkraflutning v.m.

Harumframt hava vit frá flogvallarleiðsluni í Føroyum fingið at vita, at radarstøðin í Mjørkadali er av avgerðandi týdningi fyri flogferðsluna um okkara leiðir, eins og upplýst verður, at radarstøðin er av stórum týdningi í samband við eitt nú bjarging við tyrlu á sjónum.

Trygdar- og verjupolitiskar skipanir eru sostatt ein týðani patur av ikkihernaðarligum skipanum í Føroyum.

### Altjóða yvirgangur

Hóast tað er lítið sannlíkt, at altjóða yvirgangur fer at raka Føroyar, ella at tey, ið fyriskipa og fremja yvirgang, halda til - ella fara at halda til í Føroyum, kann eingin veita trygd fyri, at hettar ikki fer at gerast - ella er veruleiki. Sum njótarar av globaliseringini ynskja vit at kunna ferðast trygt úti í heimi, eins og vit ynskja at kenna okkum trygg her á klettunum. Samanumtikið hava vit tí eisini skyldu at taka globala ábyrgd og geva til kennar, at vit ítøkiliga ynskja at vera við til at tryggja heimsfriðin. Alt annað er dupultmoralur, undanførsla og ábyrgdarloysi.

### Hvør er okkara leiklutur?

Uttanríkispolitikkur og verjupolitikkur eru ríkismál. Tí er tað púra nattúrligt, at ríkisfelagsskapurin rindar fyri raksturin av hesum málsøkjum, eins og ríkisfelagsskapurin í dag rindar fyri eitt nú løgreglu og rættarskipan.

At vit leggja land til egna verju er ikki annað enn nattúrligt.

Hvat herskyldu viðvíkur, eru Føroyar eins og eitt nú Ísland eitt ógvuliga lítið samfelag - uttan her- hernaðarliga siðvenju. Hóast tað, ber væl til at vera partur av einum verjufelagsskapi, uttan at seta í verk tvungna herskyldu.

Tað kundi verið áhugavert at kannað, í hvønn mun hernaðarlig útgerð og hernaðarlig starvsfólk kundu verið ein meira skipaður partur av føroysku tilbúgvingini á sjógvi og landi, eins og tað tá kundi verið ein samráðingarspurningur, í hvønn mun Føroyar rindaðu ein part av hesi tilbúgving.

### Altjóða samfelagið hevur tikið ábyrgd

Við m.a. friðarvarðveitandi og uppbyggjandi arbeiði í ófriðarherjaðum og tilafturskomnum økjum í heiminum og við at stuðla eitt nú fyrrverandi sosialistisku londunum fíggjarliga í teirra búskaparligu neyð, hevur altjóða samfelagið tikið ábyrgd og arbeiða londini í felag fyri at tryggja fólkaræði, framburð og frið í heiminum. Tí er at vóna, at breið undirtøka verður á Føroya Løgtingi fyri einari skilagóðari og ábyrgdarfullari verjusamtykt, har tann veruleiki, at Føroyar øll árini hava verið - og eru partur av trygdar- og verjusamgonguni NATO, formliga verður staðfestur.



**NØVN Í VIKUNI**

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Skála Kvøldskúli:

# Dugnaskaparroynd í sigling á Skála



*Hesir hava staðið dugnaskaparroynd í sigling í Skála Kvøldskúla í apríl 2004:*
*Aftast f.v. Frits Thomsen lærari, Eyðun Anthoniussen, Jens Bech, Edvard Jóanesarson, Jacob Martin Jacobsen, André F. Danielsen lærari.*
*Fremst f.v. John Olsen, Christian Weihe, William Højgaard, Jákup Andrias Hentze.*

Malan Marnersdóttir:

# Nýggjur professari í bókmentafrøði á Setrinum

TÍÐINDASKRIV

Mikudagin tekur Malan Marnersdóttir, Dr. Phil alment við sum professari á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Malan Marnersdóttir er 52 ára gomul og hevur starvast á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum síðani 1983. Fyrstu 3 árini sum adjunktur, men síðani 1986 sum lektari í bókmentum. Síðani 1998 hevur Malan verið rektari Setursins.

Sum vanligt, tá ið vísindastørv vera sett ella fólk framflutt, so er tað altjóða metingarnevnd, sum ger úrskurð. Í metingarnevndini hava sitið Dr. Jürg Glauser, professari á Universitetinum í Zürich, Dr. Dagný Kristjánsdóttir, professari á Háskóla Íslands og Dr. Idar Stegane, professari á Universitetinum í Bergen.

Í sambandi við professaratilnevningina skipar Fróðskaparsetrið fyri móttøku og fyrilestri í Loftsstovuni á Føroyamálsdeildini mikudagin 19. mai kl. 15.00 har Jóan Pauli Joensen, vararrektari handar professarabrævið og Malan Marnersdóttir heldur starvstøkufyrilestur við heitinum "leita og tú skalt finna."



Frits Johannesen, 60 ár:

# Heiðurskonsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 22. mai 2004 fyllir Frits Johannesen, lærari, kórleiðari og listamaður í Fuglafirði, 60 ár. Í hesum sambandi verður skipað fyri hátíðarhaldi í Mentanarhúsinum fríggjadagin 21. mai kl. 19.00.

Skráin verðu fjølbroytt við t.d. Havnarkórinum, Kór Glyvra Kirkju, Siloakórinum, Fuglafjarðar Hornorkestri, Fuglafjarðar Sangkóri og Fuglafjarðar Gentukóri, eisini spæla Kim Hansen og Stanley Samuelsen.



Eisini heldur Mentamálaráðharrin røðu.

Ein myndaframsýning av gomlum myndum hjá Frits verður í Riberhúsi. Framsýningin verður opin fríggjadagin, leygardagin, og sunnudagin.

Um kvøldið verður almennur dansur við Silly Boys.

## Minningarorð um
## Magnhild á Toftini

Magnhild á Toftini í Syðrugøtu andaðist 18. februar 2004. Magnhild var ein sermerkt kvinna, og vit í Gøtubrá eru takksom fyri tann góða stuðul og fyri stóra sjálvbodna arbeiði, hon hevur veitt okkum gjøgnum øll árini síðani 1994, tá Gøtubrá varð stovnað fyri at betra umstøðurnar hjá pensionistunum.

Tað er stórur saknur, nú Magnhild ikki er millum okkum meira, men saman við okkum fekk hon ta gleði at uppliva, at sambýlið í Gøtu varð byrjað.

Magnhild gav okkum mong vitug ráð. Hennara vinalag hava vit havt stóra gleði av og eru sera takksom fyri. Við hennara áliti á Harran hevur hon verið eitt gott fyridømi fyri okkum.

Okkara tankar fara eisini til Sofus og familjuna, sum hava mist so nógv.

Heiðrað veri minnið um Magnhild.

**Vegna Dagtilhaldið Gøtubrá**
**Rigmor**

## Lea Wolles forkvinna í felagnum fyri autistar

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Á aðalfundinum hjá Landsfelagnum fyri fólk við autismu, stytt LFA, sum var tann 13. mars 2004 vórðu trý nýggj fólk vald í nevndina. Fyri vali stóðu: Sigtór Andreassen, Dennis Hansen og Eyðun Hellá. Eingin teirra stillaði uppaftur.

Nevndin skeyt upp at velja Eivin Simonsen, Kristu Brimheim og Hugo Leo fyri teir. Hetta varð samtykt. Nýggja nevndin hevur skipað seg soleiðis:

Lea Wolles forkvinna, Hugo Leo skrivari, Lone Húsgarð kassameistari, Eivin Simonsen tiltakslimur og aspergers umboð, og Krista Brimheim tiltakslimur.

Nýggja nevndin hevði sín fyrsta fund leygardagin 2. mai 2004. Hon hevur sett sær nøkur mál at arbeiða við til næsta aðalfund. M. a. er ætlanin at endurskoða og gera nýggjan faldara um autismu og asperger syndrom. Leygardagin 22. mai er ætlanin at skipa fyri einum limafundi við tí fyri eyga at seta foreldrabólk/ar á stovn. Hetta verður gjørt fyri, at foreldur at børnum, sum koma undir autismubreiddarbrekini, so sum Infantil autisma, Atypisk autisma og Aspergers Syndrom, javnan kunnu hittast og tosa um sína støðu. Foreldur kunnu so geva møguligar royndir viðvíkjandi sínum barni víðari til foreldur, sum kanska ikki kenna so væl til brekið.

Ætlanin er eisini at fáa Jóhannu Hansen, sernámsfrøðing, at greiða frá einum foreldra- og systkinaskeiði, sum hon hevur verið á hjá Center for Autisme í Danmark. Hetta verður gjørt fyri at vekja áhuga fyri einum skeiði, sum eftir ætlan verður hildið í Føroyum í september í viku 37 við Lennarti Petersen. Hann starvast sum fakligur leiðari og sálarfrøðingur á Center for Autisme. Lennart Petersen hevur áður verið í Føroyum og havt fyrilestrar, vegleitt stovnum og hildið skeið.

LFA vil eisini virka fyri, at børn, har sum illgruni er um, at atferðartrupulleikin er innan autismubreiddarbrekið, skulu fáa ásett eina diagnosu so tíðliga sum gjørligt, so at m. a. sernámsfrøðilig tiltøk rundan um barnið kunnu setast í verk beinanvegin. Hetta verður gjørt við m. a., at kunna avvarðandi myndugleikar um støðuna hjá einari familju við barni, sum ber brek innan autismubreiddarbrekini.

## Dagurin

**19. mai. Potentiana**. Rómversk genta, sum 16 ára gomul varð tikin av døgum í Róm.